# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 24-06-2021

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021

(Kvotutøl stillað og loyvt at flyta allar avlopskvotur frá 2020 til 2021)

### § 1

Í kunngerð nr. 85 frá 26. mai 2021 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis: "Við heimild í § 22, stk. 1, § 23, stk. 1 og 2, § 34, stk. 1, nr. 1-4, stk. 2, nr. 2-4 og 6-10 og stk. 3-5, § 38, stk. 3, § 39, stk. 2, § 50, stk. 4 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020 og løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, verður ásett:"

**2.** Í § 2 verður "107.396 tons" broytt til: "167.048 tons".

**3.** Í § 3, stk. 1 verður "69.996 tons" broytt til: "144.648 tons".

**4.** Í § 3, stk. 2 verður "56.567 tons" broytt til: "126.349 tons".

**5.** Í § 4, stk. 1 verður "25.644 tons" broytt til: "51.944 tons".

**6.** Tvær staðni í § 5 verður "5.429 tons" broytt til: "10.997 tons".

**7.** Tvær staðni í § 6 og tvær staðni í § 7 verður "1.363 tons" broytt til: "2.760 tons".

**8.** Tvær staðni í § 8 verður "9.427 tons" broytt til: "19.096 tons".

**9.** Tvær staðni í § 9 verður "2.772 tons" broytt til: "5.616 tons".

**10.** Tvær staðni í § 10 verður "970 tons" broytt til: "1.966 tons".

**11.** Tvær staðni í § 11 verður "923 tons" broytt til: "1.869 tons".

**12.** Í § 12, stk. 1 og 2 verður "192 tons" broytt til: "389 tons".

**13.** Í § 15 verður "3.564 tons" broytt til: "7.960 tons".

**14.** Í § 16 verður "9.129 tons" broytt til: "14.199 tons".

**15.** Í § 17 verður "4.921 tons" broytt til: "10.992 tons".

**16.** Aftan á § 18 verður sett:

"**§ 18 a.** Persónur, felag ella eigari av ávísum fiskifari kann flyta egna árskvotu av makreli, sum ikki er fiskað í 2020 til at verða fiskað í 2021.
*Stk. 2.* Nøgd av felags árskvotu av makreli, sum í 2020 var tillutað ávísum bólki av fiskiførum, men sum ikki varð fiskað, verður flutt til 2021. Nøgdin verður í 2021 latin sum felags árskvota."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, xx. juli 2021

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert